# Oddamaður í SEV: Førir kapping til bíligari streym er tað í fínasta lagi

**– Kann kapping tryggja okkum bíligari streym, er tað í fínasta lagi, sigur Hans Tausen Olsen, formaður í umboðsnevndini hjá SEV**

SEV OG KAPPING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Kann kapping føra til at at streymurin verður bíligari, kann SEV ómøguligt hava nakað ímóti tí.

Hans Tausen Olsen er formaður í umboðsnevndini hjá SEV, sum er hægsta vald í elfelagnum.

Og hann heldur avgjørt, at SEV eigur at verða opið fyri teimum kanningum, sum ætlanin nú er at seta í verk fyri at vita um tað ber til at skapa kapping um streymveitingina.

Í Útvarpinum mánadagin hoyrdu vit landsstýrismannin í orkumálum siga, at ein hornasteinur í komandi orkupolitikkinum hjá landsstýrinum verður at streymurin skal verða bíligari og tað skal kapping á økinum syrgja fyri.

Ì hesum sambandi hevur SEV altíð sagt, at el-kervið hjá SEV tolir ikki at fleiri veitarar koma á netið.

Men nú ætlar landsstýrið at fáa granskingarstøðina í Risø at kanna hetta páhaldið til fulnar.

Hetta heldur formaðurin í umboðsnevndini er í fínasta lagi.

– Higartil havi eg bert hoyrt málið lýst frá einari síðu og tað er frá SEV, sum sigur, at el-kervið hjá SEV tolir ikki, at fleiri veitarar koma á netið.

Hans Tausen Olsen heldur tí, at tað er í fínasta lagi, at serfrøði á økinum ger eina óhefta kanning av málinum.

– SEV hevur bæði teknisk og politisk umboð í teimum nevndum, sum arbeiða við yvirskipaða orkupolitikkinum og eini elveitingarlóg. Sostatt koma eisini sjónarmiðini hjá SEV fram í hesum sambandi og tað kunnu vit bara fegnast um.

Formaðurin í umboðsnevndini sigur, at við eini slíkari kanning fáa vit tað endaliga staðfest, hvat ber til á hesum øki og ikki.

– Tað haldi eg avgjørt er í fínast lagi og tí eigur SEV at vera opið fyri eini kanning fyri at sleppa undan hesum evindaliga stríðnum, sum nú hevur verið í fleiri ár um, hvat ber til og hvat ikki ber til. Lat okkum síggja úrslitið av eini slíkari kanning og so kunnu vit arbeiða víðari útfrá tí.


*– Alt, sum kann fáa prísin á streymi at lækka, er hjartaliga vælkomið, eisini kapping á økinum, sigur Hans Tausen Olsen, formaður í umboðsnevndini hjá SEV*

## Eiga at vera opin

Hans Tausen Olsen vísir á, at SEV hevur sjálvt gjørt kanningar sum vísa, at tað er ógvuliga avmarkað, hvat el-kervið hjá SEV tolir av øðrum veitarum afturat.

– Men prógva nýggjar kanningar tað øvugta, eigur SEV avgjørt at vera opið fyri tí og tað eigur SEV ikki at mótmæla. Hetta er tvørturímóti ein spurningar, vit altíð eiga at viðgera.

Hans Tausen Olsen sigur, at tá ið sjálvur landsstýrismaðurin metir, at kanning fer at tryggja okkum bíligari streym, eigur tað at vera serliga spennandi hjá SEV at vera við í einum slíkum arbeiði.

– Øll vilja hava bíligari streym, serliga brúkarin, og letur tað seg gera, kann ongin mótarbeiða tí, heldur ikki SEV, hóast fleiri veitarar verða á økinum og sostatt eisini kapping.

– Tað er altíð skeivt at forða fyri tiltøkum, sum kunnu føra til, at streymurin verður bíligari og kann tað prógvast, at kapping er betri fyri brúkaran, er tað bara ein veldugur fyrimunur, sigur Hans Tausen Olsen.

## Eiga at stremba fram ímóti reinari orku

Annars vísir formaðurin í umboðsnevndini á, at í løtuni henda stór framastig í royndunum at finna aðrar orkukeldur enn orku og í royndunum gera alternativar orkukeldur meiri áitandi.

– Vatni, vindi og aldu hava vit nógv mikið av og í hesum døgum henda stór frambrot í royndunum at fáa álítandi orkukeldur burturúr teimum.

Sjálvur ivast Hans Tausen Olsen ikki í, at um eini 15-20 ár eru eini 70% av okkara orkukeldum rein orka og tað eigur eisini at vera eitt mál, sum SEV eigur at stremba fram ímóti.

Samstundis fegnast hann um, at gongd nú verður sett á vatnorkuútbyggingina á Eiði, sum umboðsnevndin einmælt hevur samtykt at fara undir.




## Vágs kommuna heldur tørn

Í Vági er býráðið farið undir arbeiðið at leggja fíggjarætlanina fyri komandi ár.

Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri, sigur, at í tí arbeiðnum verður gingið útfrá, at skattaprosentið skal vera óbroytt, 22,5%. Samstundis verður barnafrádrátturin óbroyttur, 2500 krónur fyri hvørt barnið. Eitt sum tó kann broyta hetta, er, at nú kommunurnar skulu yvirtaka barnaverndarøkið, ætlar landið at lækka landsskattin fyri at kommunurnar kunnu hækka kommunuskattin til at fíggja barnaverndarøki.

Annars sigur borgarstjórin, at inntøkumetingarnar fyri í ár koma ikki at halda. Tá íð fíggjarætlanin varð løgd í fjør varð mett, at inntøkan í skatti í ár fór at vera 32,3 milliónir, men inntøkan verður neyvan meiri enn 30 milliónir, heldur gongdin fram sum nú.

Næsta ár ætlar býráðið at fara varisliga fram og tí verður ikki roknað við hægri inntøkum næsta ár.

**-áki-**

## Vágs Kommuna skrivar søgu

Býráðið í Vági hevur samtykt at halda fram við søguskrivingini.

Higartil eru tvær bøkur givnar út, sum Poul Andreasen hevur skrivað um søguna hjá Vágs Kommunu.

Men nú hevur Vágs Býráð samtykt at fáa hann at skrivað eina bók afturat, sum skal taka okkum heilt inn í nútíðina.

Tað fer at taka eini trý ella fýra ár at skriva bókina og at fáa hana út, so bókin er ikki væntandi, fyrrenn í 2007 ella 2008.

**-áki-**

## Samtykkja at endurstovna felagskommununa í Suðuroy

Vágs Býráð hevur nú samtykt at taka undir við, at felagskommunan í Suðuroy verður endurskipað.

Fyri nøkrum árum síðani høvdu kommunurnar í Suðuroy eina felagskommunala nevnd, har borgarstjórarnir høvdu sætið og hittust við jøvnum millumbilum at tosa um mál av felags áhuga.

Men tað arbeiðið datt skjótt niðurfyri, men nú verður so aftur ein roynd gjørd at endurskipa felagskommuna og tað samtykti Vágs Býráð á fundi í farnu viku at taka undir við, sigur Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri.

**-áki-**

## Eva Maria var yngri

Í sambandi við heilsurenningina í Suðuroy leygardagin,varð nógv gjørt burturúr, hvussu fjølbroyttur luttakaraskarðin var. Har varð nevnt, at yngsti luttakarin var seks mánaðir. Men nú havavit fingið at vita, at tað var ikki heilt rætt tí ein lítil didda úr Vági, sum eitur Eva Maria, var eisini við og hon er bara tveir mánaðir.

**-áki-**